# Námsskipan fyri
# BSSc í samfelagsvísindum

Galdandi frá 1. august 2021.

## 1. Fororð til tey lesandi frá lestrarráðnum

Góðu lesandi

Ein námsskipan inniheldur grundreglurnar fyri tykkara lestur. Tí hevur tað alstóran týdning, at tit lesa og skilja hana. Saman við skeiðslýsingum og yvirskipaðum reglum hjá Setrinum, er námsskipanin eitt týðandi amboð, sum tit eiga at brúka. Á tann hátt kunnu tit kenna tykkara rættindi og tykkara skyldur.

Sambært viðtøkurnar fyri Lestrarráð skal Lestrarráðið fáa uppskot til útbúgvingarprofilar og námsskipanir til viðgerðar og góðkenningar frá útbúgvingarleiðara, eftir at útbúgvingarleiðarin hevur fingið svar frá hoyringspørtum. Tá ið uppskot til námsskipan hevur verið viðgjørt, og vissa er fingin fyri, at viðkomandi partar eru hoyrdir, góðkennir lestrarráðið námsskipanina og letur dekaninum hana til víðari avgreiðslu.

Lestrarráðið hevur eftirlit við, at ymisku partarnir av útbúgvingini hanga saman, og at einstøk fak ella fakøki ikki broytast ov nógv í mun til endamálið við útbúgvingini. Ráðið skal eisini tryggja, at veitta undirvísingin og próvtøkukrøvini hóska til endamálið við útbúgvingini.

Henda námsskipanin er góðkent av Lestrarráðnum á Søgu- og samfelagsdeilini tann 12. mai 2020. 10 og við smærri broytingum góðkendar 16. apríl 2021

Vegna Lestrarráðið



Árni Jóhan Petersen, formaður

## 2. Innihaldsyvirlit


**1. FORORÐ TIL TEY LESANDI FRÁ LESTRARRÁÐNUM ........ 2**

**2. INNIHALDSYVIRLIT ........ 3**

**3. INNGANGUR ........ 5**

**4. ÁBYRGD ........ 5**

**5. YVIRSKIPAÐ ENDAMÁL VIÐ ÚTBÚGVINGINI ........ 5**

**6. UPPTØKUTREYTIR ........ 5**

**7. ÚTBÚGVINGARHEITIÐ ........ 5**

**8. FØRLEIKAR ........ 5**

8.1 LÆRUÚRTØKUR ........ 5
8.2 STARVSMØGULEIKAR OG VÍÐARI LESNAÐUR ........ 6

**9. BYGNAÐUR OG INNIHALD Í ÚTBÚGVIGNINI ........ 6**

9.1 BYGNAÐUR ........ 6
*9.1.1 Skiftislestur ........ 7*
9.2 INNIHALD Í ÚTBÚGVINGINI ........ 8
*9.2.1 Sosiologi og antropologi ........ 8*
*9.2.2 Stjórnmálafrøði ........ 8*
*9.2.3 Vísindaástøði og háttalag ........ 8*
*9.2.4 Føroysk nýtíðarsøga ........ 8*
*9.2.5 Búskapur og samfelag ........ 9*
*9.2.6 Ritgerð I ........ 9*
*9.2.7 Samfelagsástøði ........ 9*
*9.2.8 Háttalag I ........ 9*
*9.2.9 Valfak I + II ........ 9*
*9.2.10 Háttalag II ........ 10*
*9.2.11 Ritgerð II ........ 10*
*9.2.12 Samfelagsplanlegging ........ 10*
*9.2.13 Sosialvísindi ........ 10*
*9.2.14 Praksisfak ........ **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.***
*9.2.15 Globalisering og samfelagsbroytingar ........ 11*
*9.2.16 Bachelorritgerð ........ 11*
9.3 TÍÐARÆTLAN FYRI BACHELORNÁMIÐ Í SAMFELAGSVÍSINDI ........ 11

**10. HJÁNÁM Í SAMFELAGSVÍSINDUM ........ 12**

**11. PRÓVTØKA OG GONGD Í LESNAÐINUM ........ 12**

11.1 PRÓVTALSSTIGI ........ 13
11.2 PRÓVDØMING ........ 13
11.3 PRÓVTØKUMÁL ........ 14
11.4 ENDURPRÓVTØKA OG SJÚKRAPRÓVTØKA ........ 14
11.5 FRÁMELDING TIL PRÓVTØKU ........ 14
11.6 BÓLKAARBEIÐI ........ 14

**12. GÓÐSKRIVING ........ 14**

**13. LESTRARVIST** ..... **15**

**14. KÆRUR** ..... **15**

**15. AÐRAR LEIÐREGLUR** ..... **15**

15.1 FARLOYVI ..... 15
15.2 ÚTSKRIVING ..... 16
15.3 SAMSKIFTI ..... 16
15.4 NÁMSSTIG OG ARBEIÐSTYNGD ..... 16
15.5 LESTRARÁRIÐ ..... 16

**16. TREYTIR UM BROYTING Í NÁMSSKIPAN** ..... **16**

# 3. Inngangur

Í hesum skjali er námsskipanin fyri bachelorútbúgvingina samfelagsvísindi lýst. Við heimild í Løgtingslóg nr. 58 frá 9 juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, og Kunngerð nr. 85 frá juni 2009 ásetur námsskipanin innihaldið í útbúgvingini og reglurnar fyri, hvussu útbúgvingin verður útint. Útbúgvingin fylgir somuleiðis Bolognayvirlýsingini um eina felags evropeiska útbúgvingarskipan og er skipað eftir hesum leisti. Námsskipanin inniheldur ikki skeiðslýsingar fyri tey einkultu fakini og heldur ikki almennar reglur hjá Setrinum. Hesar eru at finna á heimasíðu setursins.

# 4. Ábyrgd

Námsskipanin fyri samfelagsvísindi er ábyrgdarøki hjá Lestrarráðnum á Søgu- og samfelagsdeildini. Úbúgvingarleiðarin hevur fakligu ábyrgdina og leggur útbúgvingina til rættis.

Møguligar kærur skulu handast skrivliga til dekanin, sí kapitul 13.

# 5. Yvirskipað endamál við útbúgvingini

Bachelorútbúgvingin í samfelagsvísindum er normerað til 180 ECTS og hevur til endamáls at geva tí lesandi førleikar innan samfelagsvísindaliga fakøkið, ið skikkar tann lesandi til víðari hægri lestur (MSSc, MA, og samsvarandi) og gevur førleikar til størv á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum.

# 6. Upptøkutreytir

Treytirnar fyri upptøku eru, at tann lesandi hevur staðið miðnámsskúlaprógv (kvota 1) ella samsvarandi førleikar (kvota 2).

# 7. Útbúgvingarheitið

Bachelornámið gevur rætt til heitið Bachelor í samfelagsvísindum, stytt BSSc í samfelagsvísindi (á enskum: Bachelor in Social Science, abbreviated as BSSc in Social Science).

# 8. Førleikar

Útbúgvingin gevur tí lesandi holla vitan um- og samfelagsvísindaliga fakøkið og serkunnleika innan sosiologi og samfelagsgreiningari. Tann lesandi fær innlit í føroyska og altjóða samfelagsviðurskifti og hvussu føroysku samfelagsstovnarnir hava ment seg og virka í dag. Harumframt fær tann lesandi holla vitan um ástøði og arbeiðshættir innan økið og hvussu hesi verða nýtt til at granska, lýsa, greina og loysa samfelagsvísindaligar trupulleikar og planleggingaruppgávur í nútíðarsamfelagnum. Útbúgvingin gevur eisini tí lesandiroyndir og serkunnleika í tvørvísindaligum arbeiðshættum og spurdómsstýrdum kanningarverkætlanum.

## 8.1 Læruúrtøkur

Útbúgvingin gevur tí lesandi eina røð av fakligum og almennum førleikum. Eftir loknan lestur hevur hin lesandi fyrst og fremst ognað sær hesar:

Fakligir førleikar

- **Grundleggjandi faklig vitan**: at megna at ogna sær gott innlit í samfelagsvísindalig evni, hugtøk og ástøðilig rák í einum faksøguligum konteksti og eina holla fatan av ástøðum og arbeiðshættum innan samfelagsvísindaliga fakøkið.
- **Nágreinilig faklig vitan**: duga at ogna sær vitan um sosiologi, antropologi, stjórnmálafrøði, búskaparfrøði og lógfrøði, og at arbeiða tvørfakliga við við evnum sum vælferðarsamfelagið, fólkaræði, globalisering, modernisering, mentan, stættir, kyn, miðlar, minnilutar, osfr., í granskingarverkætlanum og samfelagsuppgávum.
- **Vitan um føroyska samfelagið**: megna at lýsa og greina føroyska samfelagið og mentanina í søguligum og nútíðar-høpi, og at kanna og granska samfelagsbroytingarnar og samspælið millum privatar og almennar stovnar.
- **Førleika at savna inn tilfar**: duga at arbeiða við samfelagsvísindalig háttaløg og at savna inn data/tilfar á ein vísindaetiskan og vísindaástøðiliga forsvarligan hátt, og at viðgerða og greina tilfarið á vælgrundaðan hátt.

Almennir førleikar

- **Kritiskir førleikar**: megna at hugsa og arbeiða vísindaliga, at orða neyvar trupulleikaorðingar, at greiða og greina data/tilfar, og at koma til eina niðurstøðu.
- **Skrivligt og munnligt samskifti**: megna at orða seg greitt og logiskt, bæði á skrift og í talu, bæði í óformligum og formligum høpi, og at luttaka í samskiftivið onnur fak- og leikfólk og at bera fram kritiskar hugsanir, sjónarmið og úrslit á greiðan og sannførandi hátt.
- **Førleiki at arbeiða sjálvstøðugt og at seta verkætlanir ígongd:** Duga at planleggja og samskipa sítt vísindaliga arbeiði við lestrarførleika og fróðskaparhegni á høgum støði, soleiðis attú sjálvstøðugt megnar at styrkja tína vitan og at menna tínar førleikar.
- **Altjóða samstarv:** megna at arbeiða í toymum, sum eru tvørfaklig og altjóða, og at gevaeitt fakligt íkast til altjóða faklig orðaskifti.

### 8.2 Starvsmøguleikar og víðari lesnaður

Útbúgvingin gevur førleikar til víðari hægri lestur (MSSc, MA) og størv innan almenna og privata arbeiðsmarknaðin.

## 9. Bygnaður og innihald í útbúgvignini

Útbúgvingin í Samfelagsvísindum tekur 3 ár. Hvørt lestrarár er skipað í tveimum lestrarhálvum, sum hvør sær telja 30 ECTS. Tilsamans eru seks lestrarhálvur. Fakini eru vanliga skipað í hesum støddum: 2½ ECTS, 5 ECTS, 10 ECTS og 20 ECTS.

### 9.1 Bygnaður

Lesturin er skipaður í tveir høvuðstættir, fak og ritgerðir (verkætlan), og hvørt lestrarár fáa tey lesandi undirvísing innan vísindaliga fakøkið, umframt at tey sjálvstøðugt skulu skriva eina spurdómsstýrda uppgávu.

Fyrsta árið (1. og 2. lestrarhálva) hava tey lesandi grundskeið innan samfelagsvísindaliga fakøkið, har serligur dentur verður lagdur á at geva tí lesandi eina grundleggjandi vitan og fatan av teimum mest brúktu og týðandi ástøðunum og arbeiðshættunum innan økið. Eisini verður dentur lagdur á, at tann lesandi skal nemur sær hollan kunnleika til altjóða og føroysk - og samfelagsviðurskifti, sosiala menning, og hvussu samfelagsstovnarnir í Føroyum hava ment seg og virka í dag. Fakini, undirvíst verður í, eru: Sosiologi, stjórnmálafrøði, vísindaástøði og háttalag, føroysk nýtíðarsøga, og búskapur og samfelag. Haraftrat skulu tey lesandi skriva eina ritgerð, har tey skulu nýta ástøði og háttaløg, tey hava lært um, til at greiða eina spurdómsstýrda verkætlan úr hondum. Verkætlanin verður gjørd einsæris ella í bólki.

Annað árið (3. og 4. lestrarhálva) hava tey lesandi skeið innan samfelagsvísindaliga fakøkið, har dentur serliga verður lagdur á at menna sína servitan um og kritisku fatan av teimum fjølbroyttu ástøðiligu tilgongdunum og arbeiðshættunum innan samfelagsvísindi. Fakini, undirvíst verður í, eru: Valfak I+II, antropologi, háttalag I+II. Harumframt skulu tey lesandi skriva eina ritgerð, har tey skulu nýta ástøði og háttalag, tey hava lært, til at greiða eina spurdómsstýrda kanning úr hondum. Verkætlanin verður gjørd ensæris alla í bólki.

Triðja árið (5. og 6. lestrarhálva) hava tey lesandi skeið innan sosialvísindi og samfelagsplanlegging, har arbeitt verður víðari við evnum og spurningum, sum skeiðini á fyrsta og øðrum ári tóku upp. Hin lesandi skal, við øðrum orðum, betra um sína vitan og fatan um samfelagsvísindi sum empiriska og ástøðiliga vísindagrein. Undirvíst verður í hesum fakum: Samfelagsplanlegging, sosialvísindi, evnisøki og globalisering og samfelagsbroytingar. Tey lesandi skulu haraftrat skriva eina bachelorritgerð (6. lestrarhálva), har kravið er at tey leggja til rættis og femja eina spurdómsstyrda kanning innan fakøkið samfelagsvísindi. Bachelorritgerðin er at rokna sum sveinastykkið hjá tí lesandi.

Lesturin verður skipaður soleiðis:

## Bachelor í Samfelagsvísindum

| | **Fak og Ritgerð** | | |
|---|---|---|---|
| **1. semestur** | Sosiologi (10 ECTS) | Stjórnmálafrøði (10 ECTS) | Vísindaástøði og háttalag (10 ECTS) |
| **2. semestur** | Føroysk nýtíðarsøga (10 ECTS) | Búskapur og samfelag (10 ECTS) | Ritgerð I (10 ECTS) |
| **3. semestur** | Valfak I (10 ECTS) | Antropologi (10 ECTS) | Háttalag I (10 ECTS) |
| **4. semestur** | Valfak II (10 ECTS) | Háttalag II (10 ECTS) | Ritgerð II (10 ECTS) |
| **5. semestur** | Samfelagsplanlegging (10 ECTS) | Sosialvísindi (10 ECTS) | Evnisøki (10 ECTS) |
| **6. semestur** | Globalisering og samfelagsbroytingar(10 ECTS) | Bachelorritgerð (20 ECTS) | |

### 9.1.1 Skiftislestur

Hin lesandi kann taka í mesta lagi 60 ECTS frá øðrum universiteti sum skiftislesandi. Mælt verður til, at lesandi, sum hava hava hug til at fara uttanlands sum skiftislesandi, brúka annað lestrarárið (t.v.s. 3. og/ella 4. lestrarhálvu) til hetta. Valfak I+II skulu tá á sama hátt vera innan samfelagsvísindaliga fakøkið og

stuðla undir førleikarnar innan samfelagsvísindi. Áðrenn farið verður á skiftislestur, skulu øll fak undangóðkennast av lestrarráðnum.

## 9.2 Innihald í útbúgvingini

Fakliga innihaldið í útbúgvigingini er nágreiniliga lýst í skeiðslýsingum og pensumlistum, sum eru at finna á heimasíðu setursins. Skeiðslýsingar innihalda hesar upplýsingar: skeiðsnummar, heiti, ECTS námstig, fortreytir, stig, endamál við skeiðnum, innihald, læru- og undirvísingarhættir, læruúrtøka, próvtøkuháttur, próvdøming, próvtalsstigi, lestrarlisti og ábyrgd. Pensumlistin er uppgivin í sambandi við tímaætlanina fyri skeiðið.

Undirvísingin verður skipað sum fyrilestrar, seminar/verkstovur, venjingar, bólkaarbeiði, heimauppgávur og verkætlanararbeiði. Hetta verður lýst í skeiðslýsingunum. Niðanfyri er stutt lýsing av innihaldinum í skeiðunum í útbúgvingini:

### 9.2.1 Sosiologi

Endamálið er at geva lesandi eina grundleggjandi innleiðslu í vísindagreinini sosiologi við denti á vísindaástøðiliga menning og faklig orðaskifti, hugtøk og granskingarspurningar, ástøði og háttaløg innan økini. Tey lesandi læra at kritisk reflektera yvir og brúka hugtøk og ástøði at greina viðkomandi sosiologisk evni. Skeiðið fevnir um klassisk og nýggjari ástøði, sæð í einum søguligum og samtíðar ljósi. Ástøði verður knýtt at týðandi evni innan fakøkini, t.d. stætt, vald, vælferð og familju, og sett inn í ein føroyskan og altjóða kontekst.

### 9.2.2 Stjórnmálafrøði

Endamálið við skeiðinum er at geva lesandi innlit í føroyskan politikk og tey mest týðandi ástøðini innan stjórnmálafrøði. Evni, ið verða viðgjørd, eru: ástøði um statin, vald, politiskir flokkar, ideologiir og skipanir, ið verða brúkt í eini kritiskari stjórnmálafrøðiligari lýsing av politisku stovnunum og flokkunum seinastu øldina, og hvussu hesir eru broyttir, sum umstøðurnar eru broyttar. Í hesum sambandi verður eisini hugt nærri at, hvussu politisk mentan og áhugabólkar ávirka gongdina.

### 9.2.3 Vísindaástøði og háttalag

Endamálið við skeiðinum er at geva lesandi grundleggjandi vitan um vísindaástøði og háttaløg. Skeiðið er býtt upp í tríggjar partar. Í fyrsta parti fáa tey lesandi eina innleiðslu í lestrarførleika og fróðskaparhegni, har tey læra at taka ábyrgd fyri sínari egnu læring og at leggja sín lestur til rættis. Í øðrum parti fáa tey lesandi grundleggjandi vitan um mest týðandi vísindaástøðiligu stevnurnar. Í triðja parti fáa tey lesandi innlit í og yvirlit yvir mest brúktu og týðandi kvalitativu og kvantitativu háttaløgini innan samfelagsvísindi, og hvussu hesi eru knýtt til tær vísindaástøðiligu stevnurnar.

### 9.2.4 Føroysk nýtíðarsøga

Endamálið við skeiðnum er, at veita teimum lesandi grundleggjandi kunnleika um Føroya søgu eftir ár 1500 við denti á politisku søguna, yvirlit yvir týðandi gransking, sum er tøk á økinum og grundleggjandi førleikar til at meta um dygdina á útvaldum verkum og søguligum heimildum. Tey lesandi fáa í gjøgnum skeiðið grundleggjandi kunnleika um politisku søgu Føroya eftir 1500. Hugt verður eftir útvaldum

bókmentum, sum snúgva seg um modernaða føroyska søgu, og føroysk søga verður sett inn í eitt størri evropeiskt høpi.

### 9.2.5 Búskapur og samfelag

Endamálið við skeiðinum er at veita teimum lesandi innlit í grundleggjandi partar av vísindagreinini búskaparfrøði, herundir týðandi hugtøk og myndlar. Týðandi evni eru m.a. útboð og eftirspurningur, marknaðarmekanismur, marknaðarinntriv, produktivitetur og búskaparvøkstur, búskaparsveiggj og konjukturstýring og altjóða handil.

### 9.2.6 Ritgerð I

Endamálið við skeiðinum er at læra tey lesandi at skriva eina akademiska ritgerð. Tey lesandi skulu sjálvstøðugt fyrireika og gjøgnumføra eina spurdómsstýrda kanning, har tey kritiskt nýta hugtøk/myndlar/ástøði, sum tey hava fingið innlit í, leita fram heimildir og tilfar (empiri), greina og koma til eina niðurstøðu. Tey lesandi læra at avmarka eitt greiðsluevnisøki (problemfelt) og orða ein kanningarspurdóm (problemformulering), savna heimildartilfar saman, kritisk greina og seta úrslitini upp í eina samfelagsvísindaliga ritgerð eftir vanligari akademiskari siðvenju. Uppgávan verður skrivað í bólki ella einsæris.

### 9.2.7 Antropologi

Endamálið er at geva tí lesandi eina holla fatan av antropologi sum vísindagrein í samfelagsvísindum við serligum denti á ástøði, háttalag og vísindaligt kjak í sosialantropologi í okkara tíð. Tey lesandi skulu visa at tey kenna antropologisk grundhugtøk og duga at greiða frá týðandi antropologisk ástøði. Tey skulu eisini kenna søguligu menningina av fakinum. Tey skulu duga at brúka antropologisku hugtøkini og ástøðini, tey hava lært, til gera eina sjálvstøðuga lýsing og greining av samfelagsligum evnum.

### 9.2.8 Háttalag I

Endamálið við skeiðinum er at geva tí lesandi eitt yvirlit yvir og innlit í mest týðandi kvantitativu háttaløgini í samfelagsvísindum, t.d. lýsandi (descriptive) og útleiðandi (inferential) hagfrøði, og at menna praktisku førleikarnar hjá tí lesandi at nýta hesi háttaløg í einari greining. Tey lesandi læra m.a. at fremja regressjónsgreining, at gera eina chi í øðrum roynd, og við hesum amboðum at duga at próvføra fyri møguligum samanhangum ímillum variablar í einum datasetti. Eisini fær tann lesandi innlit í, hvussu ein skipar og setur saman spurnabløð.

### 9.2.9 Valfak I + II

Endamálið við valfakunum er at geva lesandi møguleika at nema sær servitan og royndir innan eitt fakøki, ið hevur teirra serliga áhuga. Valfak skulu liggja innanfyri samfelagsvísindaliga fakøkið og stuðla undir førleikarnar innan samfelagsvísindi, og vera viðkomandi fyri útbúgvingina sum heild. Útbúgvingarleiðarin ásetir, hvørji skeið verða boðin út sum valfak og kann gera hetta í samráð við tey lesandi og teirra áhugamál. Øll valfak skulu góðkennast av lestrarráðnum.

### 9.2.10 Háttalag II

Endamálið við skeiðnum er at geva tí lesandi innlit í tey mest týðandi kvalitativu háttaløgini, sum verða nýtt í samfelagsvísindum. Undirvíst verður m.a. í interview, eygleiðing, luttøku, dokumentgreining og etnografiskum og biografiskum háttaløgum.
Harumframt verður undirvíst í, hvussu kvalitativ og kvantitativ háttaløg kunnu stuðla undir hvørt annað, tá tey verða sett saman í einari kanning. Eisini læra tey lesandi um etisk viðurskiftir og vísindaetiskar reglur og ásetingar í samband við gransking.

### 9.2.11 Ritgerð II

Endamálið við skeiðinum er at læra tey lesandi at gera eina tvørvísindaliga granskingarverkætlan. Tey lesandi skulu sjálvstøðugt gera eina spurdómsstýrda kanning, har tey kritiskt nýta hugtøk/myndlar/ástøði/tilgongd úr minst tveimum fakøkjum, t.d. stjórnmálafrøði og antropologi, ella búskaparfrøði og sosiologi, og sjálvi leita fram heimildir og tilfar, greina og koma til eina niðurstøðu. Undirvíst verður í, hvat tvørvísindi er, og hvussu tann tvørvísindaliga tilgongdin kann nýtast í sambandi við spurdómsstýrdar granskingarrannsóknir. Í verkætlanini skulu tey lesandi avmarka eitt tvørvísindaligt evnisøki og orða ein kanningarspurdóm (problemformulering/research question), savna heimildartilfar saman og greina og seta úrslitini upp í eina samfelagsvísindaliga ritgerð eftir vanligari akademiskari siðvenju. Uppgávan verður skrivað í bólki ella einsæris.

### 9.2.12 Samfelagsplanlegging

Endamálið er, at tann lesandi ognar sær vitan um og fatan av samfelagsplanlegging í breiðum høpi, tvs. at seta seg inn í tey sjónarhorn og tær tilgongdir, sum stuðla undir tilætlaða samfelagsliga menning, virði og avgerðir, umframt um livikor og sosialt (burðardygg) kor hjá samfelagsbólkum og felagsskapum. Hetta í søguligum og samanberandi perspektivi, í ástøðiligt grundaðari fatan og samanhangi, umframt innlit í háttaløg innan gransking av samfelagsplanlegging.

### 9.2.13 Sosialvísindi

Endamálið er, at tann lesandi tilognar sær vitan um og fatan av vælferðarsamfelagnum og tann sosiala geiran, bæði í ástøðiligum og empiriskum høpi. Skeiðið kannar hvønn týdning mentan, samleiki og sivilsamfelag, og samspælið millum hesi, hava fyri væferðarsamfelagið. Hin lesandi fær vitan um samspælið millum samfelags broytingar og social viðurskifti, t.d. í mun til politikk, vinnu og integratión, bæði í dag og í søguligum ljósi. Eisini skal hann duga, kritisk og sjálvstøðugt, at ástøðiliga og háttalagsliga at greina vælferðarsamfelagið í einum samanberandi perspektivi.

### 9.2.14 Evnisøki

Endamálið er at geva tí lesandi møguleika at ogna sær vitan og førleikar innan ávís temu, sum kunnu vera tvørfaklig ella samfelagsvísindalig. Evnisøkini eru tematisk skipað – og ikki skipað eftir einum ávísum fakøki – og kunnu snúgva seg um t.d. fiskivinnusamfelagið, politiska vistfrøði, oyggjasamfeløg, Arktis og ferðavinnu. Skeiðini broytast sostatt eisini regluliga. Eisini kunnu vera temu, sum geva tí lesandi praktiskar førleikar at røkja og loysa arbeiðsuppgávur innan samfelagsvísindaliga økið, t.d. hagfrøði, GIS (Geographical Information System) og løgfrøði. Evnisøkið kann verða eitt ávíst fak, sum telur 10 ECTS, men tað kann eisini setast saman av fleiri minni fakum, sum telja 2 1/2 ECTS ella 5 ECTS. Útbúgvingarleiðarin ásetur hvørji skeið verða boðin út, og kann gera hetta í samráð við tey lesandi og teirra áhugamál.

### 9.2.15 Globalisering og samfelagsbroytingar

Endamálið er, at tann lesandi ognar sær framkomna servitan um víðkað innlit í samfelagsvísindalig og tvørvísindalig kjak, hugtøk og ástøði viðvíkjandi globalisering/altjóðagerð og samfelagsbroytingar í lokalum, nationalum og altjóða kontekstum í dag. Skeiðið skal geva tí lesandi djúptøkna vitan um tær prosessir, sum ávirka sosialu, mentanarligu, politisku og institutionellu broytingarnar og rembingarnar í samfelagnum. Skeiðið skal fáa hin lesandi til at megna at kritiskt reflektera yvir, kanna og greina samfelagsspurningar, sum knýta seg til tað lokala/globala (mikro/makro) samspælið í samfelagnum í dag, t.d. í mun til spurningar um samleika, flytføri, burðadygd og sosialan ójavna.

### 9.2.16 Bachelorritgerð

Endamálið við bachelorritgerðini er at geva teimum lesandi møguleika at vísa, at tey duga at arbeiða vísindaliga, við at fáa tey at greiða eina spurdómsstýrda kanning úr hondum. Tann lesandi skal sjálvstøðugt skipa fyri og gjøgnumføra eina spurdómsstýrda kanningarverkætlan og kritiskt nýta hugtøk/ myndlar/ástøði í fakøkinum, leggja tilrættis eina kanning og leita fram heimildir og annað empiriskt tilfar, gera eina sjálvstøðuga greining av hesum tilfari og koma til eina greiða niðurstøðu, ið vísir til og svarar setta granskingarspurdóminum. Uppgávan kann skrivast í bólki ella einsæris.

Treytin fyri at fara í holt við bachelorritgerðina er, at tann lesandi hevur staðið í minsta lagi 140 ECTS innan byrjan.

## 9.3 Tíðarætlan fyri bachelornámið í samfelagsvísindi

| Semestur / Fak og Ritgerð | 1. | 2. | 3. | 4. | 5. | 6. | ECTS |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sosiologi | | | | | | | 10 |
| Stjórnmálafrøði | | | | | | | 10 |
| Vísindaástøði og háttalag | | | | | | | 10 |
| Føroysk nýtíðarsøga | | | | | | | 10 |
| Búskapur og samfelag | | | | | | | 10 |
| Ritgerð I | | | | | | | 10 |
| Valfak I | | | | | | | 10 |
| Antropologi | | | | | | | 10 |
| Háttalag I | | | | | | | 10 |
| Valfak II | | | | | | | 10 |
| Háttalag II | | | | | | | 10 |
| Ritgerð II | | | | | | | 10 |
| Samfelagsplanlegging | | | | | | | 10 |
| Sosialvísindi | | | | | | | 10 |
| Evnisøki | | | | | | | 10 |
| Globalisering og samfelagsbroytingar | | | | | | | 10 |
| Bachelorritgerð | | | | | | | 20 |
| *ECTS í alt* | | | | | | | *180* |

# 10. Hjánám í samfelagsvísindum

Møguligt er at lesa hjánám í samfelagsvísindum og høvuðsfak í øðrum fakøki. Tá verður kravt at man hevur 60 ECTS í samfelagsvísindi á bachelor.

Lesturin verður skipaður soleiðis:

### Hjáfak í samfelagsvísindum (60 ECTS) við bachelor í aðrari lærugrein

| | Fak og Ritgerð | | |
|---|---|---|---|
| **1. semestur** | Sosiologi* (10 ECTS) | Stjórnmálafrøði (10 ECTS) | Vísindaástøði og háttalag* (10 ECTS) *ella* Sosialvísindi *ella* Samfelagsplanlegging |
| **2. semestur** | Búskapur og samfelag (10 ECTS) | *Høvuðsfak* | *Høvuðsfak* |
| **3. semestur** | *Høvuðsfak* | Antropologi (10 ECTS) | *Høvuðsfak* |
| **4. semestur** | *Høvuðsfak* | *Høvuðsfak* | *Høvuðsfak* |
| **5. semestur** | *Høvuðsfak* | *Høvuðsfak* | *Høvuðsfak* |
| **6. semestur** | Altjóða politikkur (10 ECTS) | *Høvuðsfak* | |

*um *Sosiologi* er partur av høvuðsnáminum, so skal hin lesandi ístaðin taka skeiðið *Háttalag I*. Um *Vísindaástøði og háttalag* er partur av høvuðsnáminum, so kann hin lesandi ístaðin taka eitt av hesum skeiðunum: *Sosialvísindi* ella *Samfelagsplanlegging*.

# 11. Próvtøka og gongd í lesnaðinum

Tá tann lesandi er upptikin á útbúgvingina, skal eitt innskrivingarblað útfyllast og latast Lestrarskrivstovuni. Tá hetta er gjørt, er tann lesandi samstundis innskrivaður til allar próvtøkurnar í útbúgvingin - undantikið valfakini á øðrum ári. Tá lestrarhálvan við valfakinum byrjar (lestrarhálva 3+4), skulu tey lesandi velja valfak og melda seg til fakið á skrivstovuni á deildini. Tá tey eru tilmeldað valfakið, eru tey samstundis automatiskt tilmeldað próvtøkuna.
Lesandi, sum hava verið í farloyvi, skulu melda seg til fakini, tey skulu hava, á skrivstovuni á deildini.

Próvtøka er í hvørjari lærugrein sær, og hon verður skipað eftir einum av niðanfyristandandi próvtøkusløgum ella sum ein samanseting av hesum:

a) munnlig próvtøka
b) skrivlig próvtøka
c) munnlig framløga, ið telur við í samlaða karakterinum
d) skrivlig avrik (t.d. heimauppgávur, essay, ella synops) ið telja við í samlaða karakterinum
e) munnlig próvtøka við støði í ritgerð
f) próvdøming av ritgerð

## 11.1 Próvtalsstigi

Próvdømingin fer fram við støði í 7-talsstiganum[1] ella sum "staðið/ikki staðið". Fyri at hava staðið fakið krevst metið 02. Próvtal verður givið soleiðis:

12: fyri framúr gott avrik.
Verður givið fyri avrik, sum lýtaleyst ella mest sum lýtaleyst lýkur málini í lærugreinini.

10: fyri sera gott avrik
Verður givið fyri sera gott avrik, ið við onkrum smávegis lýtum lýkur flestu málini í námsætlanini í lærugreinini.

7: fyri gott avrik.
Verður givið fyri gott avrik, ið við nøkrum lýtum, væl lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini.

4: fyri hampuligt avrik.
Verður givið fyri hampuligt avrik, ið hevur fleiri grov lýti og ikki lýkur málini væl í námsætlanini í lærugreinini.

02: fyri nøktandi avrik.
Verður givið fyri toluligt avrik, ið akkurát stendur mát, og í minsta mun lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini.

00: fyri ikki nøktandi avrik.
Verður givið fyri ikki nøktandi avrik, ið ikki stendur mát og ikki lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini.

-3: fyri heilt vánaligt avrik.
Verður givið fyri heilt vánaligt avrik,
sum als ikki kann verða góðtikið.

## 11.2 Próvdøming

Próvdømingin kann vera við uttanseturs ella innanseturs próvdómara. Tá próvdømingin er uttanseturs, verður avrikið dømt av undirvísaranum og próvdómara, sum ikki er í starvi á Fróðskaparsetrinum. Uttanseturs próvdómarar skulu góðkennast av Mentamálaráðnum. Tá próvtøkan er innanseturs, verður avrikið dømt av undirvísaranum og einum vísindastarvsfólki á Fróðskaparsetrinum.

---

[1] Próvtalsstigin og hvussu hesin verður umsettur til enskt, og samanbering av 7-talsstiganum við 13-talsstigan, er nærri lýstur í Kunngerð um próvtalsstiga og døming, Nr. 73, 31. mai 2013.

Galdandi reglur um próvtøkur eru at finna her: Kunngerð um skiftisreglur fyri lesandi á Fróðskaparsetri Føroya, sum byrjað hava lesturin áðrenn 1. august 2008, og reglur um alment próvskeið í føroyskum, nr. 85, 9. juni 2009.

Minst 2/3 av próvtøkunum (120 ECTS) skulu vera dømdar av uttanseturs próvdómara, og í mesta lagið 1/3 av próvtøkunum (60 ECTS) kunnu verða dømdar av innanseturs próvdómara. Próvtøkutreytirnar í teimum einstøku skeiðunum standa í skeiðslýsingunum.

### 11.3 Próvtøkumál

Próvtøkumálið er føroyskt. Tó kann próvtøkumálið vera skandinaviskt ella enskt mál, um hin lesandi, undirvísarin ella próvdómarin ikki skilir føroyskt. Um próvtøkan verður skipað á øðrum máli enn føroyskum, skal hetta gerast í samráð við hin lesandi. Er talan um valfak, har undirvísingin er á skandinaviskum ella enskum máli, verður próvtøkan á sama máli sum undirvísingin. Tó skal hin lesandi hava møguleika at velja eitt valfak, har undirvísing og próvdøming er á føroyskum.

### 11.4 Endurpróvtøka og sjúkrapróvtøka

Tann lesandi kann í mesta lagi tríggjar ferðir fara til próvtøku í sama faki. Um fakið ikki verður staðið við fyrstu roynd, er møguligt at fara til endurpróvtøku tvær ferðir. Dekanurin kann geva loyvi til frávik frá hesari reglu eftir skrivligari umsókn, um serligar umstøður tala fyri tí. Um hin lesandi gerst sjúkur og ikki kann fara til próvtøku, so er møguligt at fara til sjúkrapróvtøku. Fyri at fara til sjúkrapróvtøku krevst læknaváttan. Sjúkrapróvtøka telur ikki við sum endurpróvtøka.[2] Lesandi sum ikki hevur staðið eitt kravfak í útbúgvingini eftir tríggjar royndir, hevur ikki møguleika at gjøgnumføra útbúgvingina.

### 11.5 Frámelding til próvtøku

Fyri at verða roknaður sum virkin lesandi skal hin lesandi fara upp til próvtøku við fyrsta próvtøkuhøvið. Møguligt er at melda seg frá próvtøkuni, og skal hetta gerast í seinasta lagi 14 dagar eftir at skeiðið er byrjað. Lesandi, sum ikki melda seg frá próvtøku innan hesa freist, og heldur ikki møta upp til próvtøku, verða skrásett sum "ikki staðið", og telur hetta við í teimum trimum møguleikunum, tey hava at fara upp til próvtøku. Frámelding til próvtøku verður gjørd í telduposti, sum skal sendast til skrivstovuna.

### 11.6 Bólkaarbeiði

Ein partur av lesnaðinum kann vera skipaður sum bólkaarbeiði - t.d. kunnu ritgerð I + II, bachelorritgerðin og aðrar smærri verkætlanir avrikast í bólki. Um lesandi taka seg úr einum bólki, ella bólkurin fer í tvíningar, so hava øll í bólkinum líkarætt til at brúka tilfarið, sum er framleitt í bólkinum.

## 12. Góðskriving

Um lesandi hevur staðið fak á øðrum universitetum, sum eru á sama ella hægri fakligum støði við sama fakliga innihaldi og/ella kunnu stuðla undir útbúgvingini sum heild, kunnu tey søkja um at fáa hesi fak góðskrivað, sum partar av útbúgvingini á Fróðskaparsetrinum. Tó kunnu í mesta lagið 60 ECTS góðskrivast.

---

[2] Nærri kunning um endurpróvtøku og sjúkrapróvtøku eru at finna á: Kunngerð um skiftisreglur fyri lesandi á Fróðskaparsetri Føroya, sum byrjað hava lesturin áðrenn 1. august 2008 og reglur um alment próvskeið í føroyskum, nr. 85, 9. juni 2009. Sí kapitul 5, § 31-33.

Endalig avgerð, um skeið verður góðskrivað, verður tikin av lestrarráðnum. Umsókn um góðskriving skal latast deildarskrivaranum á Søgu- og samfelagsdeildini.

Søkjast kann leypandi gjøgnum arið, men um lesandi ynskja at umsóknin skal verða viðgjørd, áðrenn semestri byrjar, so er freisin hendan:

- Seinasta freist fyri várhálvuna: 1. oktober
- Seinasta freist fyri heysthálvuna: 10. januar

Nærri kunning um góðskrivingar, mannagongdir og oyðubløð er at finna á heimasíðu setursins.

# 13. Lestrarvist

Møguligt er at taka partar a útbúgvingini á øðrum universiteti sum skiftislesandi – tó í mesta lagi 60 ECTS. Áðrenn farið verður uttanlands at lesa, er neyðugt at søkja lestrarráðið um undangóðkenning av góðskrivingini.

Mælt verður til, at lesandi, sum hava áhuga í at fara uttanlanda á lestrarvist, fara á øðrum ári. Møguligt er tó eisini at fara longu fyrsta og á triðja ári, men av tí at fak um føroysk viðurskifti einans eru at finna í Føroyum, kann tað gerast trupult at finna viðkomandi fak uttanlands, og at fáa hesi góðskrivað. Fakini, sum eru á skránni á øðrum ári, finnast hinvegin á flestu universitetum uttanlands eisini, og tí er lættari at finna hóskandi fak, ið kunnu góðskrivast av Fróðskaparsetrinum.

# 14. Kærur

Kærur um avgerðir í samband við próvtøku skulu latast dekaninum skrivliga við grundgevingum. Kærufreistin er seinast 2 vikur eftir, at hin lesandi hevur fingið avgerðina at vita. Nærri kunning um kærumøguleikar er at finna á heimasíðu setursins.[3]

# 15. Aðrar leiðreglur

## 15.1 Farloyvi

Søkjast kann um farloyvi umvegis deildarskrivstovuna á Søgu- og samfelagsdeildini. Eru ivamál í hesum høpi, verður víst til lestrarvegleiðaran.

---

[3] Nærri kunning um kærumøguleikar, sí:
Løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum broytt við Løgtingslóg nr. 51. frá mai 2012, Kapitul 6a Kæra um próvtøku.

Kunngerð um skiftisreglur fyri lesandi á Fróðskaparsetri Føroya, sum byrjað hava lesturin áðrenn 1. august 2008 og reglur um alment próvskeið í føroyskum, nr. 85, 9. juni 2009, kapitul 8.

## 15.2 Útskriving

Velur tann lesandi at útskriva seg frá lestrinum, verður hetta gjørt við at venda sær til deildarskrivstovuna á Søgu- og Samfelagsdeildini og við at útfylla serligt oyðublað til hetta endamál. Vart skal gerast við, at um hin lesandi ynskir at byrja lesturin av nýggjum, so skal hann/hon søkja umaftur á jøvnum føti við onnur lesandi.

## 15.3 Samskifti

Samskifti við tey lesandi skal í stórst møguligan mun fara fram við kunningartøkni (teldupost, heimasíðu, Moodle, o.t.).

Bacheloruppgávan skal latast deildarskrivsstovuni talgilt og í tveimum pappírseintøkumi.

## 15.4 Námsstig og arbeiðstyngd

Námsstig er ein roknieind fyri støddina á einum faki og arbeiðsbyrðuna hjá tí lesandi. Hon verður uppgjørd eftir evropeisku ECTS skipanini (European Credit Transfer System). Hetta er ein felags skipan, sum ger tað lættari at flyta avrik millum lond og útbúgvingar. Námsstigini verða uppgjørd soleiðis:

- 1 ECTS svarar til 27,5 arbeiðstímar hjá tí lesandi – alt íroknað (fyrireiking + undirvísing + venjingar og próvtøka).

Flestu skeiðini telja 10 ECTS, og svarar hetta til 275 arbeiðstímar hjá tí lesandi til hvørt skeiðið. Ein fulltíðarlesandi hevur 30 ECTS hvørja lestrarhálvu, og skal tí rokna við at brúka 825 arbeiðstímar hvørt semestur.

## 15.5 Lestrarárið

Lestrarárið byrjar í viku 34 og endar í viku 25. Eingin undirvísing, sum er kravd í sambandi við útbúgvingina, fer fram uttanfyri hetta tíðarskeiðið. Tó er vanligt, at summarskeið, seminar og verkstovur liggja uttanfyri formliga lestrarárið.

# 16. Treytir um broyting í námsskipan

Útbúgvingarleiðarin kann gera uppskot til broytingar í námsskipanini, og hesar skulu góðkennast av lestrarráðnum. Lestrarráðið kann eisini heita á útbúgvingarleiðaran og viðmæla broytingar í námsskipanini. Møguligar broytingar koma í gildi við lestrarársbyrjan.

Um størri broytingar verða gjørdar í námsskipanini, skulu lesandi hava møguleika at gera seg lidnan eftir ta námsskipan, sum var galdandi, tá íð tey vórðu innskrivað sum lesandi á Søgu- og Samfelagsdeildini, ella hava møguleika at fylgja einari skiftisskipan, sum lestrarráðið skal hava góðkent.

Námsskipanin skal verða tøk á heimsíðu Fróðskaparsetursins. Útbúgvingarleiðarin kunnar dekanin á SSD um broytingar verða gjørdar, og tryggjar at galdandi námsskipan er tøk á heimasíðu Fróðskaparsetursins.